Hevna seg inn á suðuroyingar fyri at hava tapt løgtingsvalið

– Fólkaflokkurin var raskur at brúka samferðsluhavnina í Vági til valagn, men nú, hann hevur tapt valið, verður Suðuroyggin slept upp á fjall

SAMFERÐSLUHAVN
Aki Bertholdsen

– Nú fólkaflokkurin tapti løgtingsvalið í Suðuroynni, vísa teir seg frá sínu bestu síðu og venda Suðuroynni bakið og hevna seg fyri valósigurin, sigur Johan Dahl, løgtingsmaður

– Hetta er langt úti.

Johan Dahl, løgtingsmaður úr Sambandsflokkinum er ógvuliga misnøgdur við uppskotið til figgjarlóg, sum nú er til viðgerðar í Løgtinginum.

Hann er serliga argur inn á, at onki er sett av til samferðsluhavnina í Vági, hóast tað er samtykt í Løgtinginum.

– Men hetta er fólkaflokkurin, táið hann er bestur.

Hann sigur, at fólkaflokkurin gjørdi nógv burturúr at brúka samferðsluhavnina í Vági til valagn uppundir løgtingsvalið í apríl fyri at tryggja sær nakrar atkvøður.

– Men nú teir taptu valið kortini, kemur hevndin alt fyri eitt og teir sleppa Suðuroynni upp á fjall.

Johan Dahl heldur, at slíkur politikkur kann ikki takast í álvara og at tað er nú, at tinglimurin hjá Suðuroynni í samgonguni skal standa sína roynd.

– Tað, sum undrar meg, er, at tað er Vinnumálastýrið sjálvt sum hevur biðið um at sleppa at byggja samferðsluhavn í Vági, nú býráðið kortini fer at gera djúphavn.

– Samferðsla er samferðsla og hevur onki sum so við Suðuroynna at gera. Tað er ein farvegur sum einhvør annar samferðslusvegur í landinum. Og tað er langt úti at tengja samferðsluhavnina í Vági og bergholið ímillum Øravík og Hov, tí tað er langt síðani sett til at byrja í 2004 á langtíðar útbyggingarætlanini.

– Og at broyta eina lóg nú, sum er samtykt beint fyri valið, er ein beinleiðis politisk beistagerð, leggur hann afturat

Onki nýtt

Nú verður fört fram, at Suðuroyggin fær størsta partin av pengunum, sum skulu brúkast til útbyggingar komandi ár?

– Ja, tað veit eg. Men tað vistu fólkafloksmenn eisini, tá ið teir lovaðu samferðsluhavn í Vági uppundir valið. At peningur skuldi gjaldast fyri nýggju suðuroyarferjuna, hava øll vitað leingi og at tað verður neyðugt við ferjulegu í Trongisvági, vistu øll eisini. Tað er onki nýtt í hesum.

– Men annars er ikki ætlanin at játta eina krónu til vegirnar í Suðuroynni, sum eru teir vánaligastu í landinum. Og Suðuroyar Sjúkrahús fær bara 1,4 milliónafturat, samstundis sum Klaksvíkar Sjúkrahús fær 5,6 milliónir afturat og Landssjúkrahúsið 22.

– Eg veit ikki, hvør munurin er á Sjúkrahúsinum í Suðuroy og tí í Klaksvík til at tað skal vera so stórur munur á játtanini.

Nú hevur verið skotið tær og Henrik Old í skógvarnar, at tit óbeinleiðis hava saboterað samferðsluhavnina í Vági við at reisa málið av nýggjum, tí málið varð samtykt í tinginum og gekk sína gongd, Tað einasta, tit gjørdu, var at órógva málið og hetta er so avleiðingin?

– Tað er tvætt. Tað var neyðugt at reisa málið av nýggjum, tí eftir stuðulslógini, sum varð samtykt, kundi landsstýrismaðurin útseta málið so leingi, hann vildi. Tað vísir seg eisini nú. Tí var tað neyðugt at gera eina verklagslóg, sum bindur Landsstýrið at gera havnina nú. Fyri at tryggja okkum, at havnin verður gjørd nú og ikki verður útsett í tað óendaliga, løgdu Henrik Old og eg uppskotið fyri løgtingið.

– Og tað ber heldur ikki til, at tað skal vera Vágs Kommuna, sum skal hava ábyrgdina av sjálvari byggingini, og tann fíggjarliga váðan, tí tað er ikki Vágs Kommuna, sum skal gera samferðsluhavnina. Fyri at tryggja, at samferðsluhavnin fær eina dygd, sum tað almenna krevur, og verður byggiharri við tí fíggjarliga váðanum, var tað neyðugt at gera eina verklagslóg, sum Henrik Old og eg skutu upp. Annars hevði tað verið Vágs Kommuna, sum kom at standa við endan, gekk byggingin ikki sum ætlað og tað kundi blivið ein vanlukka fyri kommununa, sigur Johan Dahl.

Í stuðulslógini, sum varð samtykt beint fyri valið, stendur eisini, at tað verður neyðugt at gera eina verklagslóg, áðrenn landið kann byggja samferðsluhavnina í Vági og tað er hetta, Henrik Old og eg skutu upp at gera.

Tað er eisini átaluvert, at Bjarni Djurholm setir málini um samferðsluhavn í Vági og berghol ímillum Øravík og Hov upp ímóti hvørjum øðrum við at siga, at skal havnin gerast, verða ráð ikki til at gera bergholið.

– Men nú vísir tað seg, at peningur er hvørki settur av til samferðsluhavnina, ella til bergholið.

Hugburðurin til skúlan er skelkandi

–Tað verður prátað nógv og sussa illa um fólkaskúlan, men tað verður onki gjørt, sigur Katrin Dahl Jacobsen, løgtingslimur og lærari

FÍGGJARLÓGIN
Áki Bertholdsen

– Tað má vera antin manglandi royndir og vitan um fólkaskúlan ella avoldaður hugburður hjá myndugleikanum, sum gera, at slíkt tvætl kemur úr Mentamálaráðnum, sigur Katrin Dahl Jacobsen

– Tað er skelkandi at hoyra, hvussu konservativan hugburð, mentamálaráðið hevur til Fólkaskúlan.

Nú fíggjarlógin fyri næsta ár er til viðgerðar, fanst Katin Dahl Jacobsen, sum er løgtingslimur og lærari harðliga at tí skúlapolitikki, sum Landsstýrið hevur stungið út í kortið.

Hon vísir á, at einaferð tað ein landsstýrismaður sum í boðaði frá einum politikki, sum skuldi føra til »tann góða fólkaskúlan«.

– Men enn hava vit onki merkt til tað, heldur tvørturímóti. Tí, hvat fólkaskúlanum viðvíkur, tykist tað, sum um tað verður prátað nógv og sussað illa, men onki verður gjørt.

Skelkandi hugburður

Hon sigur, at eftir tí, landsstýrið hevur fráboðað, skuldi 2002 líkasum vera árið hjá »tí góða fólkaskúlanum«. Ein herðferð fyri sakina.

– Eg haldi, at hvørki næmingar, foreldur ella lærarar enn hava merkt nakað petti til tað. Tvørturímóti. Nú er árið við at halla, og tað er sum um, at táið tað snýr seg um fólkaskúlan, so er bara at tosa sussa eina rúgvu.

Katrin Dahl Jacobsen sipaði eisini til eina sending hjá Birgiri Kruse nú í vikuni um fólkaskúlan.

– Tað var skelkandi at hoyra, hvussu konservativur boðskapurin er úr Mentamálaráðnum. Har var barslað við 15-20 ára gomlum teorium. Og so er tað hetta misálitið og kollektiva revsingin av allari lærarastættini, sum varð avdúkað, tí nú skal hvør einstakur lærari telja, hvussu nógvar uppgávur hann rættar.

– Hetta er ikki at hava álit. Hetta er onki uttan eftirlit. Hetta hongur ikki saman við nýggjum arbeiðshættum í skúlanum og er heldur ikki ein hugburður at hava til starvsfólk. Katrin Dahl Jacobsen sigur, at lærarar sita ikki við stílum, fyrisagnum og aftursagnum á sama hátt, sum Mentamálaráðið og landsstýrismaðurin heldur. Nú skal niðurskurður fyri rætting í enskum í 8. og 9. flokki skal burtur o.s.fr.

– Tað má vera antin manglandi royndir og vitan um fólkaskúlan ella avoldaður hugburður hjá myndugleikanum, sum gera, at slíkt tvætl kemur úr Mentamálaráðnum.

Tað skúlanum tørvar mest er frið og góðar arbeiðsumstøður. Í Havn tørvar skúlin mest av øllum skúlastovur.

– Í dag ganga havnarbørn í skúla í Tilhaldinum og argjabørn í Róðrarneystinum. Úti um landið veit eg, at tað knípur hjá summum kommunum at fíggja nýggjar skúlabygningar og klára øktu krøvini, sum lógin setir.

– So vælsignað gev okkum góða læraraútbúgving, og góða eftirútbúgving og ikki minst álit, segði Katrin Dahl Jacobsen.

Hon spurdi eisini, hvat hendir, tá ið ein flokkur fer upp um 24 næmmingar og um skúlin fekk eyka tímar fyri tað. har svaraði landsstýriskonan, at tað gjørdi tað.

Eta orðini í seg aftur

Men so legði Katrin Dahl Jacobsen afturat, at kanska verður hon noydd at eta orðini um manglandi viljan hjá Landsstýrinum í seg aftur.

Tí hon sigur, at tað er ómøguligt at vita, hvat landsstýrið í veruleikanum ætlar.

– Sjálvdan hava vit sæð eina fíggjarlóg, sum er so ófullfíggjað sum hendan. Har virksemið hjá fólkaskúlanum skal lýsast, eru bara tómir teigar. Vit fáa onki at vita um næmingatal, eftirútbúgvingar o.s.fr. og tí er ómøguligt at meta um, hvussu tølini fara at halda.

Eftir uppskotinum til fíggjarlóg, skal játtanin til fólkaskúlan hækka 7,8 milliónir krónur.

– Hetta er til læraralønir og eftirlønir hjá sáttmálasettum lærarum. Hetta er lógarbundin játtan. Meir er ikki at siga, tí tað mangla tøl fyri alt virksemið í fólkaskúlanum fyri komandi ár.

– Ella er okkurt at krógva her, sum vit ikki skulu vita? Tað er løgið, at eingin útgreining av nøkrum slag er fyri eitt stórt øki sum fólkaskúlin er.

Hon spurdi síðani Annlis Bjarkhamar, landsstýriskonu í skúlamálum, hví eingin útgreining av fólkaskúlanum í uppskotinum, men tað fekk hon ikki svar uppá.

30-40 fólk stukku inn á gólvið

Nýggja útvarpsrásin hjá suðuroyingum fekk eina góða byrjan. Í dag verður aftur lagt til brots

ÚTVARP
Áki Bertholdsen

Tað vóru eini 30-40 fólk, sum stukku inn á gólvið, tá ið nýggja útvarpsrásin hjá suður-oyingum, Suðurrás fór av bakkastokki seinasta hósdag.

Suðurrás sendir einaferð um vikuna í samstarvi við Útvarp Føroya og Suðurrás er á skránni hjá útvarpinum hvønn hósdag fra kl. 17.05 til klokkan 18 og fyrsta sendingin var seinasta hósdag.

Í samband við jomfrúsendingina, hevði Suðurrás opið hús í upptøkuhølunum í Litbúðini í Vági og har nýttu fólk úr allari oynni høvi til at støkka inn á gólvið, eisini bý- og bygdaráðslimir.

Í dag er fer Suðurrás aftur í luftina. Í sendingini í dag verður tosað við stjóran í Suðuroyar Heilsølu, Magnus Jensen, sum er í ferð við at verða sett á stovn. Somuleiðis verður prátað við kolamenn í Hvalba, umframt at okkurt annað verður at frætta eisini.

Postverkið skal spara átta milliónir

Bergur í Garði, stjóri á Postverkinum, fekk sum vátan frammaná, tá hann sá fíggjarlógaruppskotið fyri 2003. Hann hevði fingið at vita frá Vinnumálaráðnum, at stovnurin fór at sleppa at hava átta milliónir í undirskoti næsta ár, men í fíggjarlógaruppskotinum er talið sett til null. Tí noyðist postverkstjórin nú at spara átta milliónir, og tað fer at merkja skerdar íløgur og fleiri uppsagnir, sigur Bergur í Garði

Bergur í Garði, stjóri á Postverkinum, fer nú at fyrireika seg til at skula spara átta milliónir krónur. Henda upphædd er nevniliga strikað í fíggjarlógaruppskotinum fyri næsta ár
Mynd: Jens Kr. Vang

FÍGGJARLÓG
Jón Brian Hvidtfeldt

Postverk Føroya skal vera útreiðsluneutralt næsta ár, tað vil siga, at stovnurin skal ikki kosta landskassanum nakað. Tað stendur í uppskotinum til fíggjarlóg fyri næsta ár.

Hetta kemur illa við hjá stjóranum á Postverkinum, Bergur í Garði, sum 2. september í ár lat Vinnumálaráðnum sítt tilmæli til fíggjarætlan fyri stovnin næsta ár. Í uppskotinum hevði hann mett, at Postverkið fór at hava undirskot upp á 10 milliónir krónur næsta ár, skal stovnurin rekast á verandi støði. Úr Vinnumálaráðnum fekk hann síðan at vita, at Postverkið fór at fáa átta milliónir krónur næsta ár, sigur Bergur í Garði.

Av teimum átta milliónunum skuldu fimm milliónir krónur nýtast til íløgur, meðan tríggjar milliónur skuldu nýtast til raksturin. Peningurin til íløgur skuldi serliga nýtast til at fáa eina nýggja postavgreiðsluskipan, til kunningartøkni og til eina fíggjarætlanarskipan, umframt aðrar smærri íløgur. Summar av íløgunum eru longu farnar í gongd, og játtanin næsta ár var í so máta bara eitt framhald av eini verandi íløgu, men hesar ætlanir mugu nú steðgast, sigur Bergur í Garði. Hann leggur tó afturat, at ikki ber til at steðga øllum íløgum á stovninum.

Bergur í Garði sigur, at trupult er at fremja sparingar á postverkinum uttan at siga fólk úr starvi, tí umleið 80 prosent av samlaðu útreiðslunum á stovninum fara til lønir.

– Vit hava framt nógvar sparingar og hava harumframt havt ein inntøkuvøkstur seinastu árini, sigur Bergur í Garði og vísir á, at tað eru ikki meira enn nakrir fáir mánaðir síðan at vinnumál. Men hvirki fyrr enn fíggjarlógaruppskotið var farið til prentingar, fekk eg at vita, at játtanin var strikað, sigur Bjarni Djurholm. Hann leggur afturat, at ábyrgdin av at játtanin til Postverkið er strikað, tí liggur hjá landsstýrismanninum í fíggjarmálum.

Bjarni Djurholm vísir á, at hann í eina tíð hevur arbeitt við at umskipa Postverkið til alment partafelag. Í hesum sambandi skulu fleiri broytingar gerast á stovninum, og eisini skulu lógarbroytingar til. Bjarni Djurholm sigur, at verða hesar broytingar framdar, so ber til at spara tær átta milliónir krónurnar, sum Postverkið fer at hava í undirskoti næsta ár. Men enn væntar nakað í, áðrenn Postverkið kann umskipast til alment partafelag, og landsstýrismaðurin hevur heldur ikki fingið vissu fyri, at politisk undirtøka er fyri at umskipa Postverkið. Tí vil Bjarni Djurholm hava pengar á fíggjarlógina fyri næsta ár til stovnin.

– Tað er beinleiðis ímóti mínum vilja, at játtanin til Postverkið er burtur. Tí havi eg boðað Karsten Hansen frá, at eg vil hava vissu fyri, at eg fái politiska undirtøku í Tjóðveldisflokkinum fyri at umskipa Postverkið til alment partafelag. Fái eg ikki tað, so skal Karsten Hansen seta tær átta milliónirnar aftur á játtanina til Postverkið, sigur ein avgjørdur Bjarni Djurholm. Hann leggur afturat, at í løtuni verður arbeitt í Vinnumálaráðnum við lógarbroytingum fyri Postverkið, og fær hann politiska undirtøku í samgonguni fyri at umskipa Postverkið, so metir hann tað bera til at umskipa stovnin, og harvið spara tær átta milliónirnar, longu næsta ár.

– Hetta er eitt óheppið signal at senda út, at landsstýrismaðurin í fíggjarmálum bara strikar játtanina til Postverkið av fíggjarlógaruppskotinum, sigur Bjarni Djurholm, og leggur afturat:

– Tað er Karsten Hansen, sum hevur strikað pengarnar, og tí verður tað eisini hansara uppgáva at fáa teir aftur á fíggjarlógina, kann Tjóðveldisflokkurin ikki taka undir við at umskipa Postverkið, sigur Bjarni Djurholm.

Kom óvart á

Bjarni Djurholm, landsstýrismaður í vinnumálum, sum eisini varir av Postverkinum, er skelkaður av, at ikki eitt oyra er sett á fíggjarlógina til Postverkið.

– Eg hevði boðað frá, at Postverkið hevði tørv á átta milliónum krónum úr Landskassanum næsta ár, og hevði eisini biðið um at fáa pengarnar á játtanina til postgjøldini hækkaðu, so tað ber illa til at hækka tey eina ferð afturat. Hann sigur, at skal Postverkið spara átta milliónir krónur næsta ár, so slepst ikki undan uppsagnum.

– Nú eg síggi tølini í fíggjarlógaruppskotinum er tað mín skylda sum leiðari á stovninum at fara at fyrireika sparingar. Eg havi eingi boð fingið um, at politiski myndugleikin hevur nakrar aðrar yvirordnaðar ætlanir við stovninum, og tí noyðist eg nú at seta meg niður at finna út av, hvar eg kann spara átta milliónir krónur, sigur Bergur í Garði.

Keyptur ella seldur

Stjórin á Postverkinum, Bergur í Garði, hevur sum nevnt ikki fingið nøkur boð um, hvørjar politisku framtíðarætlaninar eru fyri Postverkið. Tí fer hann nú undir at fyrireika seg til at skula spara átta milliónir krónur næsta ár. Hann ætlar sær at gera eitt upplegg til, hvar pengarnir kunnu sparast.

– Tað er mín skylda, tá eg nú síggi tølini í fíggjarlógaruppskotinum, at taka tey í álvara. Tí fari eg nú at fyrireika sparingar á stovninum. Tað er greitt, at tá eingir pengar eru, so mugu vit at nýta neyðbremsuna. Vit hava longu framt tær innanhýsis sparingar, sum vit kunnu, og tá 80 prosent av okkara útreiðslum fara til lønir, er ikki trupult at ímynda sær, at sparingin fer at merkja nógvar uppsagnir, sigur Bergur í Garði, stjóri á Postverkinum.

15 prosent dýrari at nýta Strandferðsluna

Skal roknistykkið hjá Strandferðsluni ganga upp, skulu ferðaseðlakostnaðirnir hækka við tilsamans seks milliónum krónum næsta ár. Í meðal verður tað 15 prosent dýrari at ferðast við strandfaraskipunum, meðan Bygdaleiðir sleppa við smærri hækkingum í ferðaseðlakostnaðinum. – Sleppa vit ikki at hækka ferðaseðlaprísirnar, so mugu vit hava seks milliónir krónur úr Landskassanum, sigur Reidar Nónfjall, stjóri á Strandferðsluni

FÍGGJARLÓG
Jón Brian Hvidtfeldt

Tað verður í framtíðini dýrari at ferðast við skipunum hjá Strandferðsluni. Í fíggjarlógaruppskotinum fyri 2003 er roknað við seks milliónum krónum í meirinntøkum av príshækkingum á Bygda- og Oyggjaleiðum.

Reidar Nónfjall, stjóri á Strandfaraskipum Landsins, sigur, at neyðugt er at hækka ferðaseðlakostnaðirnar, skal roknistykkið ganga upp.

– Sleppa vit ikki at hækka ferðaseðlakostnaðin, so mugu vit fáa pengarnar á fíggjarlógini í staðin fyri, sigur Reidar Nónfjall.

Játtanin til Strandferðslluna í fíggjarlógaruppskotinum fyri næsta ár er 74,6 milliónir krónur, og tað er tað sama sum í ár, um útreiðslan til nýggjar stabilisatotar til Smyril, sum er mett at kosta umleið fýra milliónir, verður drigin frá. Strandferðslan hevur gjørt sína fíggjarætlan fyri næsta ár eftir teimum fortreytum, sum eru galdandi í løtuni, tvs. at Skálafjarðaleiðin, siglingin hjá Sam um Leirvíksfjørð og siglingin hjá Smyrli á Vág eru við í roknistykkinum. Eisini hevur Strandferðslan lagt upp fyri, at eingin sigling verður um Vestmannasund og at inntøkurnar frá flogleiðini helst fara at minka næsta ár.

Í seinastuni hevur verið frammi, at Skálafjarðasiglingin møguliga skal niðurleggjast, men Bjarni Djurholm, landsstýrismaður í vinnumálum, hevur í hesum sambandi fört fram, at peningurin skal nýtast til vegerð á vestara armi á Skálafjørðinum í staðin, og tí fær Strandferðslan sum so ongan ágóða av, um siglingin, sum kostar umleið seks milliónir um árið, verður niðurlagd.

Neyðugt við dýrari ferðaseðlum

Reidar Nónfjall sigur, at neyðugt er at hækka ferðaseðlakostnaðin, skal Strandferðslan megna at halda seg á nøkunlunda somu játtan næsta ár, sammett við í ár.

– Strandferðslan er í tí støðu, at vit sleppa ikki at røra tænastustøðið. Vit sleppa ikki at spara ella skerja túratalið á nøkrum leiðum, tí at politikararnir halda fast um, at støðið skal vera óbroytt. Síðan 1997 eru lønarútreiðslurnar hjá Strandferðsluni, sum í høvuðsheitum stava frá lønarvøkstri í samfelagnum, øktar við 10 milliónum, og síðan 1998 eru útreiðslurnar til olju øktar við átta milliónum. Men samtíðis hava vit ikki hækkað ferðaseðlaprísin seinastu 10 árini. Hetta gongur ikki longur, og nú sleppa vit ikki undan at gera okkurt, sigur stjórin á Strandferðsluni.

Reidar Nónfjall vísir á, at Strandferðslan, tá hædd verður tikin fyri lønarhækkingum og útreiðslunni til stabilisatorar til Smyril, megnar at halda útreiðslurnar á sama støði næsta ár, sleppur Strandferðslan at hækka ferðaseðlaprísirnar við tilsamans seks milliónum krónum.

Strandferðslan hevur gjørt eitt uppskot um, hvar og hvussu nógv ferðaseðlakostnaðurin skal hækka. Hóast Reidar Nónfjall ikki hevur stórvegis hug at útgreina hetta uppskot, so kann hann siga so mikið, at tað í meðal verður 15 prosent dýrari at ferðast við skipunum hjá Strandferðsluni. Ferðaseðlaprísurin hækkar, bæði fyri ferðafólk og bilar, men tó mest fyri bilar, sigur stjórin á Strandferðsluni. Eisini ætlar Strandferðslan, at ferðaseðlarnir við Bygdaleiðum skulu gerast dýrari, men tó ikki so nógv. Lagt verður upp til, at hægri ferðaseðlaprísir við bussunum skulu geva tilsamans 500.000 krónur í kassan hjá Strandferðsluni.

Politisk semja

Bjarni Djurholm, landsstýrismaður í samferðslumálum, sigur, at hann hevur givið Strandferðsluni loyvi til at hækka ferðaseðlaprísirnar. Bjarni Djurholm sigur, at hann á landsstýrisfundi hevur boðað frá hesum, og at hann ikki hevur fingið ábendingar um, at undirtøka ikki er í samgonguni fyri at loyva Strandferðsluni at hækka ferðaseðlaprísirnar.

– Strandferðslan hevur í fleiri ár ikki hækkað sínar prísir, meðan útreiðslurnar hjá stovninum samtíðis eru hækkaðar nógv. Tí meti eg tað vera rætt at loyva Strandferðsluni at hækka ferðaseðlaprísirnar, sigur Bjarni Djurholm.